# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MIKKELSEN
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Neistin og VB skulu venda gongdini

**Spennandi dystur verður í Sunset deildini á Hálsi sunnudagin, tá Neistin tekur ímóti VB. Bæði liðini skulu reisa seg eftir stórtap síðsta umfar. Stjørnan tekur eisini ímóti Kyndli, og her er Stjørnan stórfavorittur**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tveir dystir eru á skránni í Sunset deildini í vikuskiftinum. Í Klaksvík tekur oddaliðið, Stjørnan, ímóti Kyndli. Stjørnan hevur vunnið báðar sínar dystir, og seinast bleiv tað til ein tryggan sigur á Neistanum. Hjá Kyndli hevur ikki gingist so væl. Tær hava bara spælt ein dyst, og ta ferðina taptu tær á VB.

Stjørnan er heilt víst favorittur at vinna henda dystin. Tær spæla á heimavølli og hava vunnið báðar sínar dystir, tí munnu tær eisini fara at vinna henda dystin. Men Kyndil kann tó saktans yvirraska norðuri í Klaksvík.

Hin dysturin, sum er á skránni í Sunset deildini, tykist meir spennandi. Her møtast Neistin og VB í høllini á Hálsi. Neistin tapti seinast í Klaksvík ímóti Stjørnuni, so tær skulu royna at fáa gongd aftur á spælið. Hjá VB sá ikki gott út síðsta vikuskiftið, tá tær fingu bank á heimavølli ímóti StÍF. Um VB ætlar sær at spæla um meistaraheitið í ár, so skulu tær vísa heilt aðrar taktir ímóti Neistanum sunnudagin. Neistin má tó metast at vera favorittur til henda dystin.

# Neistin komin í gongd



*Jugoslav Djumich hevur víst seg sum ein framúr fongur hjá Neistanum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Neistin hevur fingið vind í seglini eftir tveir tryggar sigrar á rað. Nú standa ungu hoyvíkingarnir fyri framman. Teir hava lopið hvøkk á fleiri av hinum liðunum í ár, og tí verður lagt upp til spennandi dyst á Hálsi sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Sunnudagin verður lagt upp til spennandi dyst á Hálsi, tá Neistin og H71 møta. Neistin fekk eina ringa byrjan, tá teir taptu ímóti StÍF, men eftir hetta hava teir ikki verið til at steðga. Teir hava vunnið tryggar sigrar í Kollafirði og Vestmanna, og nú bíða hoyvíkingarnir sunnudagin.

Fólk góvu ikki H71 nógvar møguleikar undan kappingarárinum. Teir høvdu størsta partin av royndu leikarunum, og nú skuldi eitt yngri ættarlið taka við. Hoyvíkingarnir ásannaðu eisini sjálvir, at tað kundi gerast tungt, men teir ætlaðu sær at royna at hanga í. Ikki kann sigast annað, enn at H71 hevur fingið eina fína byrjan uppá kappingarárið. Eftir trý umfør hava teir trý stig, og síðsta dyst fingu teir javnleik á StÍF,eftir at hava verið aftanfyri við 6 málum.

Allir mans eru tøkir hjá liðunum báðum til dystin sunnudagin. Claus Rasmussen, venjari hjá Neistanum sigur, at teir ætla at varðveita góðu støðuna, sum teir eru í.

– Nú liggja vit á fyrsta plássi saman við StÍF, og her ætla vit okkum eisini at liggja eftir vikuskiftið. H71 hevur tó spælt væl síðstu dystirnar, so teir kunnu saktans leypa ein hvøkk á okkum eisini. Men fáa vit verjuna og kontraálopini at rigga, so vænti eg heilt víst, at vit vinna dystin.

Málverjin hjá H71, Levi Nybo, væntar ein harðan dyst ímóti Neistanum.

– Spælið hjá Neistanum koyrir væl í løtuni, so eg vænti ein harðan dyst. Vit mugu bara royna at koyra í sama lag, tí trýstið liggur jú á teimum. Bæði liðini dáma væl at koyra kontra, og tí vænti eg, at kontraálop og returrenningar fara at vera avgerandi sunudagin, sigur Levi Nybo, men leggur afturat, at verjan hevur alstóran týdning fyri H71.

# VÍF skal aftur á rætta kós

**VÍF skal venda gongdini eftir tap í síðsta umfarinum, meðan KÍF sær út til at hava fingið vind í seglini. Hesi bæði liðini møtast í Vestmanna sunnudagin, men bæði mugu vera onkrar av profilunum fyri uttan**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Sunnudagin møtast VÍF og KÍF til dyst í Vestmanna. VÍF er á einum deildum triðja plássi við trimum stigum, men síðsta dyst fingu teir ein rættan frammaná, tá teir blivu hølvaðir av av Neistanum í Vestmanna. Teir ætla sær at venda gongdini sunnudagin.

KÍF hevur havt eitt heldur keðiligt kappingarár, men síðsta vikuskiftið kom gongd á. Tá vunnu teir tryggan sigur á meistarunum, sjálvt um teir vóru aftanfyri við seks málum tíðliga í dystinum. Nú er KÍF komið í gongd, og spennandi verður at síggja, um teir eisini megna at koppa VÍF.

Bæði liðini mugu vera onkrar av profilunum fyriuttan. Hjá VÍF manglar John Zacgariasseb. Hann hevur ein skaða í økslina, og tí verður hann væntandi ikki við sunnudagin. Hinvegin vóru bæði Ingi Olsen og Agnar Joensen partar av liðnum seinast, og hetta kemur sjálvandi væl við hjá VÍF. Hjá KÍF blivu bæði Karl Johan Djurhuss og Petur Martin Poulsen skaddir síðsta dyst, og teir vera ikki við móti VÍF. Óla Kristjan Djurhuus hevur eisini drigist við skaða í vikuni, men hann verður væntandi klárur til dystin.

Regin Joensen hjá VÍF sigur, at teir ætla sær sigurin sunnudagin.

– Vit ætla at reisa okkum eftir tapið síðsta vikuskiftið. Sjálvandi verður dysturin ímóti KÍF ringur, tí teir eru fullir í sjálváliti, men hetta skal ikki steðga okkum.

Vit frætta úr Kollafirði, at teir eisini fara til Vestmanna eftir sigrinum, men teir eru iki so glaðir yvir skaðarnar, sum hava rakt hópin. Men sjálvt um tveir týðandi leikarar mangla, so meta teir seg hava ein møguleika at vinna á VÍF.